# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

# Ssangyong nýggjheitir í Frankfurt

**Ssangyong nýggjheitirnar á Frankfurt Motor Show í september verða fleiri, m.a. ein heilt nýggjur luksus sedan, Ssangyong WZ, sum kemur á evropeiska marknaðin í 2009, og Ssangyong Kyron, sum hevur fingið eina sonevnda facelift**




*Ssangyong Kyron hevur fingið eina sonevnda faclift við t.d. nýggjum lyktum, kølaragittari og kúfangara og eitur nú Kyron II*



*Eisini aftan er Kyron broyttur við t.d. nýggjum lyktum og kúfangara*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ein nýggjur luksus persónbilur, SsangYong WZ, verður sýndur fram á Frankfurt Motor Show í september.

Hóast SsangYongs hava sedan útgávur koyrandi í heimlandinum Korea, hava teir higartil einans útflutt SUV útgávur til Evropa. Ætlanin er at koma á evropeiskamarknaðin við Ssangyong WZ í 2009, tá bilurin verður klárur til útflutning.

Ssangyong WZ er ein stórur, flottur og framkomin luksusbilur, sum helst kemur at kappast við luksusbilarnar á evropeiska marknaðinum.

## Kyron II

Ein onnur nýggjheit er at Ssangyong Kyron hevur fingið eina sonevnda faclift bæði innan og uttan og eitur nú Kyron II. At síggja til er størsti munurin aftan og framman við t.d. nýggjum lyktum, kúfangarum og kølaragittari.

Umframt 2.0 litra commonrail dieselmotorin við 141 hk, fær Kyron II eisini ein 2.7 litra commonrail dieselmotor við 165 hk og einum snúningsmomenti upp á 340 Nm (sami motorur sum eisini fæst til SsangyongRexton). Undirvognurin er eisini broyttur til frama fyri munandi betri komfort og koyrieginleikar.



*Ssangyong gera eisini ein størri luksusbil Ssangyong Chairman*





*Luksus persónbilurin, SsangYong WZ, verður sýndur fram á Frankfurt Motor Show í september*